LM-031/2022

Fylgiskjal 2

Annika Petersen

Fra: Herálvur Joensen på vegne af VMR-Journal
Sendt: 7. oktober 2022 10:04
Til: Astrid Reinert Øregaard
Emne: VS: Ummælisskriv til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan
Vedhæftede filer: skriv um barsilssømdir_.pdf

Fra: skrivstova@akf.fo <skrivstova@akf.fo>
Sendt: 6. oktober 2022 16:19
Til: VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>
Emne: Ummælisskriv til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan

Til Umhvørvis- og Vinnumálaráðið

Limirnir í Akademikarafelag Føroya eru fyri stórum lønarmissi, tá tey fara í barnsburðafarloyvi. At seta gjaldið úr barsilsgrunninum upp frá kr. 25.000 til kr. 27.000 ger mun, men er langt frá nóg mikið. Heldur átti gjaldið at verði sett upp til tær kr. 35.000, sum tað upprunaliga var, ella til heilt at samsvara veruliga lønarstøðið.

Fólk gjalda inn í barsilsgrunnin í mun til inntøkuna, og tí heldur Akademikarafelagið tað vera rættast, at eisini útgjaldið stendur í rímiligum lutfalli til inntøkuna.

Akademikarafelag Føroya sendi, saman við Yngri Læknum í Føroyum, Yrkisfelagnum Miðnám og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya, hin 14. september 2022 løgmanni, Bárði á Steig Nielsen, landsstýrismanninum í Fíggjarmálum, Una Rasmussen og landsstýrismanninum í Umhvørvis- og Vinnumálum, Magnusi Rasmussen skriv um betri barsilsløsmdir og um javnstøðu millum foreldur. Avrit av skrivinum er heft við hesum teldubrævi sum ískoyti til ummælið um uppskotið um broyting í løgtingslógini um barsilsskipan.

Vinarliga
Akademikarafelag Føroya

This email has been scanned by BullGuard antivirus protection.
For more info visit www.bullguard.com

This email has been scanned by BullGuard antivirus protection.
For more info visit www.bullguard.com